# Bilar

Nr. 146 • hósdagur • 7. august 2003 • 77. árg.



*Nýggi BMW-5 er størri og rúmligari enn forgangarin*

BMW 520i:

## Framkomin elegantur luksusbilur




*Bilurin hevur heilt annarleiðis design enn forgangarin*

**Tað er ikki á hvørjum degi at BMW skifta modell. Forgangarin til hendan nýggja BMW-5 kom á marknaðin í 1995. Vit royndarkoyrdu ein nýggjan BMW 520, sum er ein elegantur luksusbilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tað er nú nakað síðan fyrstu myndirnar av nýggja BMW-5 vóru at síggja í motorbløðunum. Bilurin hevur heilt annarleiðis design enn forgangarin, sum annars er ein sera snøggur bilur. At síggja ein bil á myndum og í veruleikanum er ikki heilt tað sama. Nýggi BMW-5 tekur seg væl út bæði uttan og innan. Bilurin er vaksin allar vegir. Tað at aksilfrástøðan er vaksin við 6,2 cm ger, at meira pláss er til tey ferðandi á baksterinum, eisini er viðførisrúmið vaksið frá 460 til 520 litrar. Við at brúka tilfar úr aluminium er bilurin nakað lættari enn forgangarin.

BMW-5 er fyrsti bilur í heiminum við aktivari stýring við variablari útveksling, ið er treytað av ferðini, hendan skipan gevur bilinum meira beinleiðis stýring. Skipanin lættir eisini um við parkering, tá skal rattið einans snarast tvær ferðir úr borði í borð, í staðin fyri tríggjar og eina hálva ferð, um bilurin ikki hevði hesa skipan.

### iDrive skipan

BMW-5 hevur eisini iDrive skipanina, sum er kend frá tí størra BMW-7, men hendan skipanin er nógv einfaldari og lættari at brúka. Høvuðskráirnar á iDrive skipanini eru: klima, kommunikatión, navigatión og entertainment.

Í fyrstu atløgu fæst BMW-5 sum 520i, 530i og 530d, seinni koma aðrar útgávur sum t.d. 525i, 545i og M5 við V10 motori og 500hk.

Umframt airbag frammanan, í síðunum, til høvdið og gardinairbag, hevur BMW 520i nógvar innbygdar trygdarskipanir. Standardútgerðin er eisini sera umfatandi, samstundis sum bilurin fæst við hópin av eykaútgerð sum t.d. navigatiónsskipan við 6,5" litskermi, Park Distance Control (PDC) framman og aftan, Xenon-forlyktir, einum sera framkomnum klimaanleggi, leðurinntrekk og Head-up-display í forrútinum. 6-trins girkassin er standard.

BMW 520i er ein bilur, sum heilt víst kemur at gera seg galdandi millum kappingarneytarnar í sínum klassa, bæði hvat útsjónd, komforti og koyrieginleikum viðvíkur.



*BMW 520i er ein bilur, sum heilt víst kemur at gera seg galdandi millum kappingarneytarnar í sínum klassa*

### BMW 520i

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,2 litur 6 syl bensin við 170 hk |
| 0-100 km/t: | 9,0 sek. |
| Bensinnýtsla: | 11,1 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 225/55-16 (standard) |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 484,1 cm |
| Breidd | 184,6 cm |
| Hædd | 146,8 cm |
| Eginvekt | 1560 kg |
| Viðførisrúm | 520 litrar |
| Prísur: | kr. 477.600,- |
| Søluumboð: | Bilfríðkan<br>Smiðjugerði<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 317300<br>www.bilfridkan.fo |





Heilivágur og narkotika:

## Álvarsligar hóttanir í ferðsluni

**Umframt rúsdrekkakoyring er doyvandi heilivágur og narkotika vorðin ein alt meira álvarslig hóttan í ferðsluni í Danmark. Ein kanning vísir at alkohol, narkotika ella doyvandi heilivágur eru orsøkin til minst sættu hvørja ferðsluvanlukku**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Læknar við Aarhus Kommunehospital hava kannað blóðroyndir frá 440 ymiskum persónum, sum eru deyðir í ferðsluni. Úrslitini vóru ræðandi. Fjórði hvør hevði ov høga alkoholpromillu, meðan triðji hvør hevði narkotika ella doyvandi heilivág í blóð-inum - t.v.s. fleiri enn tey sum vóru ávirkaði av alkoholi. Ábyrgdarhavandi yvirlæknin metir, við støði í hesi kanning, at evnir sum alkohol, rúsdrekka, narkotika ella doyvandi heilivágur eru atvoldin til minst sættu hvørja ferðsluvanlukku.

Ein frágreiðing frá ferðslumálaráðnum í 1998 vísti á hættisligu støðuna. Niðurstøðan tá var, at doyvandi heilivágur og narkotika, einsamøll, ella saman við alkoholi, var við at blíva ein álvarsligur trupulleiki í donsku ferðsluni, eins og í nógvum øðrum londum. Talan er um sera høg tøl, sum eiga at fáa politisku myndugleikarnar at vakna.

Tað mest ræðandi er at lógarásett promillumørk eru fyri rúsdrekkakoyring, men eingi mørk eru fyri doyvandi heilivági ella narkotika. Tað er í sjálvum sær ikki ólógligt at koyra í ferðsluni við heilivági ella narkotiskum evnum í blóðinum. Tað er einans um hesi evni ávirka evnini hjá bilføraranum "at føre køretøjet på en fuldt betryggende måde", sum tað stendur í donsku lógini.

### Kostnaðarmikil útgerð

Ein annar trupulleiki er, at politiið onga útgerð hevur at máta um ein bilførari er ávirkaður av øðrum evnum enn rúsdrekka. Um teir hava ein illgruna, er blóðroyndin einasti møguleiki fyri at fáa hetta váttað. Hendan blóðroyndin skal síðan kannast av einum rættarlækna, sum kann siga hvørji evni eru í blóðinum, har kann vera alt frá nervaheilivági til onnur hørð evnir. Hetta arbeiði er sera kostnaðarmikið, og enn mangla lógarásett mørk fyri hvussu nógv av hesum evnum kunnu vera í blóðinum. Danska politiið sendir árliga einans 200 blóðroyndir til kanningar fyri ferðsluvandamiklan heilivág ella narkotika. Til sammeting kann nevnast at umleið 5.000 norðmenn og 5.000 sviar hvørt ár verða dømdir fyri at koyra við doyvandi heilivági ella narkotika í blóðinum.

Svøríki og Týskland hava innført null-markið, so har er onki at kjakast um. Týska politiið hevur eisini fingið royndarútgerð til at taka blóðroyndir á staðnum.

Danska løgmálaráðið hevur sett eina nevnd, sum skal meta um revsikarmin fyri rúsdrekkakoyring og hvussu politiið kann fáa myndugleika at leggja upp í tá bilførarar koyra ávirkaðir av doyvandi heilivági ella narkotika.

*Kelda: FDM / Motor*

### Opel Corsa facelift



Eftir at nýggi Opel Corsa hevur verið á marknaðinum í trý ár, verður bilurin frá 2004 nakað broyttur við t.d. nýggjum lyktum, frontplátu og kølaragittari. Eisini verða nýggir bensin- og diesel motorar á skránni

*Kelda: FDM/ Motor*

### Maserati Quattroporte



Italski luksusbilurin Maserati Quattroporte verður at síggja á Frankfurt Motorshow í eini heilt nýggjari útgávu, ið minnir um tann fyrsta Quattroporte, sum kom á marknaðin í 1963. Quattroporte stendur fyri "fýra hurðar"

*Kelda: Bil Magasinet*

### Subaru Legacy



Ein Subaru Legacy við heilt nýggjum og markantum designi verður á Frankfurt Motorshow í september. Frá Subaru verður sagt, at bilurin fær meira sportligar koyrieginleikar og kemur við bæði fýra og seks syl. boxermotorum

*Kelda: Bil Magasinet*

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg